## Lancia Gran-turismo

Á Bologna Motorshow var ein nýggjur Lancia býndur fram. Talan var um framtíðarbilin Grantourismo. Lancia bilarnir verða ikki seldir í Danmark og Føroyum.

*Kelda: FDM / Motor*

## VW Touran

Ein SUV (Sport Utility Vehicles) frá VW er ávegis. VW Touran verður ein "off-road-ari" sum skal kappast við t.d. Land Roever Freelander og ein komandi BMW X3.

Onki verður sagt um nær VW Touran kemur á marknaðin.

*Kelda: FDM / Motor*

## Infiniti FX-45

Eins og Toyota hava luksusbilin Lexus, hava Nissan luksusbilin Infiniti. Í vár kemur Infiniti FX-45 á amerikanska marknaðin. Bilurin verður ein 4x4, sum skal kappast við bilar sum Mercedes M og BMW X5. Størsti motorurin verður 4.5 litur V8 við 300 hk.

*Kelda: FDM / Motor*

# General Motors – hava »enduruppfunnið« bilin

**Ongar pedalir, ongin girstong ella ratstamma. Bilurin verður drivin av brintbaseraðum brennikyknum og elektroniskari tøkni. Navnið á bilinum er Hy-wire. Bilførarin ger sjálvur av, um bilurin skal verða høgra ella vinstrastýrdur**

*General Motors Hy-wire. Framtiðarbilurin sum eftir ætlan kemur á marknaðin um átta ár. Í staðin fyri kølaragittari er ein rútur, so bilførarin kann síggja niður á vegin*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Seinnu árini hava vit lagt til merkis, at fleiri og fleiri funktiónir í bilunum blíva elektroniskar. Um nøkur ár sær tað út til, at bilurin sum bleiv uppfunnin fyri góðum hundrað árum síðan, við mekaniskum elektriskum funktiónum, verður so gott sum elektroniskur burturav. Tað vil siga at tað verður elektroniskt og elektriskt samband millum tær ymisku funktiónirnar í staðin fyri mekansikt. Navnið "Hy-wire" stendur fyri "Hydrogen" og "drive-by-wire", tí bilurin verður drivin av brintbaseraðum brennikyknum og stýrdur av elektronikki og elektriskum ledningum í staðin fyri mekaniskum sambandi.

Á Hy-wire eru øll elementir og allar stýrieindir innbygdar í ein 28 cm tjúkkan chassisbotn, sum mest líkist einum skateboard. Framman fyri bilførarar er onki instrumentborð ella fótpedalir, bert ein sokallaður "X-drive" monitorur, har alt verður stýrt frá. Bilførarin kann bremsa, accelerera og stýrast við einum handtaki. Elektroniski monitorurin registrerar tær mongu skipanirnar í bilinum. Monitorurin kann flytast tvørturum í bilinum so bilførarin sjálvur ger av um bilurin skal vera høgra ella vinstrastýrdur. Bilurin er bygdur úr aluminium og trevjuglasi. Hy-wire hevur brintbrennikyknurnar aftast í bilinum, ið levera 94 kilowatt, ella 128 hk, og ein elektromotor sum situr millum hjólini framman. Eginvektin er 1900 kg. Hjólini framman eru 20" meðan tey aftan eru 22". Ætlanin er at bilurin skal koma á marknaðin um átta ár, í 2010.

*Ongar fótpedalir og onki instrumentborð, bert ein sokallaður "X-drive" monitorur, har alt verður stýrt frá. Bilførarin ger sjálvur av, um bilurin skal verða høgra ella vinstrastýrdur*

# Jaguar – síðstu hond á teirra fyrsta stationcar

**Tað er blivið alt meira vanligt, at teir fínu luksusbilarnir hava ein stationcar í síni vøruskrá, sum t.d. BMW og Rover. Jaguar X-type, ella "baby Jaguar", sum hann eisini verður nevndur, kemur sum stationcar seinni í ár.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Á Jaguar bilverksmiðjuni verður arbeitt við at leggja síðstu hond á teirra fyrsta stationcar. Jaguar X-type, ið er bygdur yvir sama plattform sum t.d. Ford Mondeo, verður nú eisini gjørdur sum stationcar. Hetta er samstundis fyrstu ferð, at ein Jaguar verður gjørdur sum stationcar. Eins og sedan útgávan verður stationvognurin 4x4, og kemur hann eisini at fáast sum diesel. Bilurin skal kappast við BMW 300 Touring og Mercedes C-stationcar. Bilurin kemur á marknaðin seinni í ár.

*Kelda: FDM / Motor*

*Seinni í ár kemur fyrsti Jaguar sum stationcar. Talan verður um Jaguar X-type, sum er bygdur yvir sama plattform sum t.d. Ford Mondeo*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg des.93, Km 225.000.
Sýnaður 29.09.02. Kr. 59.000
Uttan bil í býti kr. 49.000,-

**PEUGEOT 405 GTX TD**
Árg des.95, Km 168.000.
Sýnaður 04.09.00. Kr. 79.000,-
Uttan býtisbil Kr. 65000,-

**VW GOLF 1.9 TDI**
HK 484
Árg nov 01, Km 8.000. Uttan býtisbil 177.000 Kr.. Kr. 189.000.

**OPEL ASTRA 1.8 STW**
Árg okt. 95, Km 64.000. Kr 79.000
Uttan býtisbil Kr. 69.000,-

**TOYOTA CARINA 1.6 STW**
Árg mei.89, Km 145.000.
Sýnaður 04.07.02. Kr. 45.000,-
Uttan býtisbil Kr. 38.000,-

**HONDA ACCORD 1.8**
LD 152
Árg apr 98, Km 84.000.
Sýnaður 06.06.02. Kr. 124.000,-
Uttan býtisbil Kr. 112.000,-
.

**RENAULT LAGUNA 1.8 H/B**
Árg okt. 01, Km 19.000.
Kr. 199.000,-
Uttan býtisbil Kr. 189.000,-

**RENAULT MEGANE 1.6 SEDAN**
Árg jun 00, Km 64.000.
Kr. 129.000.
Uttan býtisbil Kr. 119.000,-

**VOLVO 460 DL**
Árg nov. 91, Km 180.000.
Sýnaður 13.11.02. Kr. 55.000,-
Uttan býtisbil Kr. 45.000,-

**TOYOTA COROLLA 1.6 SEDAN**
Árg mei 99, Km 55.000.
Kr. 119.000,-
Uttan býtisbil Kr. 109.000,-

VOLVO
RENAULT

VR BILAR

Hoyviksvegur
tel 322110

**CHRYSLER VOYAGER 2.4I**
Árg 1995, Km 82.000 .
Kr. 115.000

**TOYOTA COROLLA 1.3I**
Árg Feb'01, Km 24.000 .
Kr. 103.000

**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan'01, Km 44.000 .
Kr. 108.000

**NISSAN ALMERA 1.4I**
Árg Okt'98, Km 64.000 .
Kr. 83.000

**SUZUKI BALENO 1.3I**
Árg Apr'00, Km 27.500 .
Kr. 108.000

**CITROEN XSARA 1.9TD**
LD 770
Árg Aug'98, Km 110.000 .
Kr. 125.000

**CITROEN AX 1.1I**
Árg mars'96, Km 85.000 .
Kr. 25.000

**PEUGEOT 405 2.0I STC.**
Árg 1995, Km 67.000. sýn jan'03.
Kr. 90.000

## VØRUVOGNAR

**CITROEN JUMPER 2.5TD LH**
Árg Aug'96, Km 120.000.
Kr. 120.000

**NISSAN SERENA 2.3D**
Árg Mai'97, Km 88.000.
Kr. 92.000

**CITROEN BERLINGO 1.9D**
Árg Okt'99, Km 68.000.
Kr. 89.000

**NISSAN SERENA 2.3D**
Árg Mai'97, Km 102.000.
Kr. 92.000

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

## Lýsingatekstur:

Lýsið brúkta bilin til sølu í Bilatorginum, sum verður prentað í Sosialinum hvønn hósdag. Lýsingarnar eru í litum og kosta 250 kr v/MVG. Teksturin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mándag kl 16:00, og gjaldast skal áðrenn lýsingin verður prentað. Setið tykkum í samband við okkum, um vit skulu taka mynd av bilinum.
Sendið okkum hendan lepan, ella støkkið inn á gólvið hjá okkum á Argjavegi 26 á Argjum

Skrivið á lepan skrásetingarnummar, árgang, kilometratal, pris og møgulgar aðrar viðmerkingar, og sendið til:

Sosialurin
Box 76
FO-110 Tórshavn
Eru spurningar, ringið 216135 ella 311820

**CITROEN XSARA HDI**
Árg 1999 nov, Km 56.000.
Kr. 125.000 .

**MAZDA PREMACY**
Árg mai. 2002, Km 19.000. Sport felgur 17" sleipikrók, CD spælara Tónaðar rútar aftan, 6 setur
Kr. 175.000

BILVERKSTAÐIÐ
V/H.J. KOLLSKER · TLF. 31 32 62 - 21 10 13
100 TÓRSHAVN